# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*



14. mars fekk Barbara ein lítlabeiggja. Hann var 53 cm langur og vigaði 3715 g. Foreldrini eita Súsan og Bjarni Joensen, og tey búgva í Viby Sjælland.



21. mars fingu Louisa á Rógvu, Vestmanna og Aagi Niclasen, Miðvágur, ein son. Hann var 50 cm langur og vigaði 3130 gr.

**Føðingar**

23. februar fingu Tóra Persson, Norðragøtu og Brian Thorleifsson Højgaard, Skála, ein son. Hann vigaði 4870 gr. og var 56 cm. langur. Tey búgva í Ålborg.

13. marts fingu Teresa og Esben Damgaard-Jarnfoss, Tórshavn, eina dóttir. Hon vigaði 1212 gr. og var 34 cm. long.

18. mars fingu Barbara A. Petersen og Óli Jákup Túgvustein, Æðuvík, eina dóttur. Hon var 53 cm. long og vigaði 3785 gr.

19. mars fingu Lotte Pedersen og Eyðstein Vágfjall, Hirtshals ein son. Hann var 52 cm langur og vigaði 3049 gr.

19. mars fingu Fríða S. Djurhuus, Vestmanna og Bárður Justinussen, Tórshavn, ein son. Hann var 57 cm. langur og vigaði 3800 gr.

21. mars fingu Sigga Jóanesarson og Regin Brattaberg Absalonsen, Vestmanna, ein son. Hann var 54 cm. langur og vigaði 4200 gr.

21. mars fingu Mirjam Zachariasen, Streymnes og Haraldur Djurhuus, Kollafjørður, eina dóttur. Hon var 50 cm. long og vigaði 2725 gr.

23. mars fingu Angilie og Agnar Joensen, Vestmanna, eina dóttur. Hon var 55 cm. long og vigaði 3850 gr.

23. mars fingu Paula S. Lervig og Óli Kristian á Torkilsheyggi, Skála, ein son. Hann var 51 cm. langur og vigaði 3350 gr.

26. mars fingu Siri Maria Mohr og Tróndur Vatnhamar, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 51 cm. long og vigaði 3450 gr.



18.03.2008 fingu Nina Brockie Hansen og Jens Marni hansen eina dóttir. Hon var 54 cm og vigaði 3400 gr.



**Prógv**

Í mars bleiv Rannvá Lamhauge Beder útlærd sum tænari á Hotel Føroyum.

**Prógv**

25. mars 2008 fekk Derhard Olsen, Holstebro, prógv sum cand.theol. á Lærda Háskúlanum í Keypmannahavn.

**Brúdleyp**

Tann 12. mars *giftust* Jógvan Sune Danielsen Tórshavn og Aileen Achas Binan í Filippininum í Býraðssalinum í San Juan í Filippininum

Leygardagin 29. mars kl. 15 giftast í Christianskirkjuni í Klaksvík, Unnur Didriksen, Válur Vestmanna og Rógvi Lassen, Klaksvík. Døgurðin verður fyri innbodnum á Sjómansheiminum. Opið hús verður frá kl. 19.30 á Brekku 45. 10. januar fingu tey eina dóttur, hon verður doypt sama dag.

# Móttøka fyri Sólrun hjá PM

Í sambandi við at Sólrun Michelsen rithøvundur og stjóri tann 11. mars 2008 fylti 60 ár, og at tann 1. apríl fer hon frá sum stjóri í PM heilsøluni, var móttøka í virkisbygnininum við Hoyvíksvegin mikudagin 19. mars.

Í 1974 settu Sólrun og maðurin, Poul Michelsen, á stovn sína egnu heilsølu í Havn. Fyrstu árini var heilsølan í heimi teirra í Gundadali til flutt varð í nýggja virkisbygningin við Hoyvíksvegin í 1980, tá Sólrun gjørdist fyrisitingarleiðari í fyritøkuni.

Umframt at hava verið stjóri í PM er Sólrun eisini rithøvundur. Hon hevur síðan 1994 givið fleiri bøkur út, skrivað stuttsøgur og yrkingar. Barnabókaheiðursløn Tórshavnar Býráðs fekk hon í 2003.



*Mikudagin 19. mars var móttøka hjá PM heilsølu við Hoyvíksvegin í sambandi við at Sólrun Michelsen, fyrisitingarleiðari í fyritøkuni, hevur fylt 60 ár, og at tann 1. apríl fer hon frá sum stjóri*

*Myndir: Rúni Patursson*



*Sólrun Michelsen og Gunnar Mohr, stjóri hjá PM*



*Nógv fólk vóru til móttøkuna*




*Kórið Glimur syngur*